Børnini í fyrsta flokki:

# Vænta tað óvæntaða av børnum

**Tað er ein stór broyting hjá teimum børnum, sum byrja í fyrsta flokki, nú tey sjálvi skulu ganga í og heimaftur úr aftur skúlanum. Tí er sera umráðandi at foreldrini hjálpa teimum við at finna tryggastu leiðina**

FERÐSLUTRYGD

Í ferðsluni skulu vit tí altíð "vænta tað óvæntaða av børnum!" Tí børn hugsa ikki altíð um tað, tey gera - tey eru spontan. Tá ið børn byrja at ganga í skúla, eru tey ikki enn før fyri at hava fulla ábyrgd av sær sjálvum í ferðsluni

Tað er ov vandamikið at lata børnini sjálv trilva seg fram í ferðsluni. Tí mugu foreldur og onnur vaksin vera á varðhaldi og hjálpa til við at finna tryggastu leiðina í skúla og fáa barnið at bera seg rætt at í ferðsluni.

Tá ið barnið fer í skúla á fyrsta sinni, liggur leiðin kanska um vegir, sum tað ikki kennir.

Finn tryggastu leiðina

Stytsta leiðin er ikki altíð tryggasta leiðin.

Tí er tað umráðandi, at tit fylgja barninum í skúla teir fyrstu dagarnar og velja ta tryggastu leiðina í skúla.

Vísið barninum á allar hugsandi ferðsluvandarnar á leiðini. Endurtakið fyri barninum allar tær einfaldastu ferðslureglurnar.

Latið barnið fara í skúla rættstundis, hvørki ov tíðliga ella ov seint, tí tað kann vera eins vandamikið.

Umráðandi er at hava góðar stundir, so at barninum ikki nýtist at skunda sær.

### Við bussi í skúla

Skal barnið við bussi er



umráðandi, at tað fær at vita, hvussu tað eigur at bera seg at.

Mælt verður til, at foreldrini eru við fyrstu túrarnar

- Umráðandi er at møta í góðari tíð.
- Eru børnini fleiri saman, mugu tey fáa at vita, at tey ikki skulu spæla ella skumpa hvør annan.
- Tá ið bussurin nærkast steðgiplássinum, skal barnið bíða til bussurin steðgar.
- Meðan bussurin, koyrir er umráðandi, at barnið situr niðri og ikki reisir seg upp, fyrr enn bussurin er steðgaður. Stendur barnið uppi, er umráðandi at hava okkurt at halda í.
- Lærið barnið at ansa sær og hava fyrilit, tá tað skal úr bussinum.
- Skal barnið tvørtur um vegin til skúlan, er sera umráðandi, at tað ikki fer tvørturum, fyrr enn bussurin er farin.
- Bussurin kann lættliga fjala ein heilan bil.

### Á súkklu í skúla

Yvirhøvur er vandamikið at súkkla úti í ferðsluni, tí lítið er gjørt fyri fólk á súkklu











- Børn yngri enn 6 ár hava als ikki loyvi at súkkla einsamøll úti í ferðsluni, men skulu vera saman við vaksnum fólki.
- Mælt verður til, at børn ikki sleppa at súkkla í skúla, fyrr enn tey eru í 10-12 ára gomul.
- Orsøkin til hetta fyrivarni er sannroyndin, at børn yngri enn 10 ár eru ikki búgvin at vera á súkklu í ferðsluni.
- Umframt at tey ikki eru kropsliga fullment, so eru tey ikki før fyri at hugsa um fleiri viðurskifti samstundis og duga ikki at meta um ferð og frástøðu hjá bilum.
- Tað er sera umráðandi, at barnið er í hjálmi, tá ið tað er á súkklu.

### 10 góð ráð

1. Er gongubreyt, skalt tú ganga har og ikki á vegnum.
2. Steðga altíð á, áðrenn tú fert út á vegin.
3. Er eingin gongubreyt, gakk tá ímóti ferðsluni so uttarliga á vegkantinum, sum til ber.
4. Er gonguteigur, far altíð eftir honum, tá ið tú skalt tvørtur um vegin.
5. Skalt tú tvørtur um vegin, er best at fara har, sum vegurin er beinur, og sýnið er gott báðar vegir.
6. Stíg ikki út á vegin, fyrr enn tú hevur hugt báðar vegir, og tú ert vís/ur í, at eingin bilur kemur.
7. Far altíð beina leið tvørturum.
8. Ansa serliga væl eftir, tá tú fert út á vegin ímillum parkeraðar bilar ella onnur støð, har tú ikki sæst beinanvegin.
9. Far yvir um vegin, har útsýnið er best.
10. Renn ikki tvørtur um vegin.

*Kelda: www.ferdslutrygd.fo*